






# DEILDARLEIÐARI TIL BÚNAÐARSTOVUNA

**Leiðslutoymi**
Í 2009 blivu táverandi Búnaðarstova og Royndarstøð løgd saman í ein stovn við einum stjóra, beinleiðis undir Fiskimálaráðnum. Nýggja Búnaðarstovan er tó framvegis ein lítil stovnur við nógvum uppgávum og stórum ætlanum. Vit arbeiða hart fyri at náa okkara málum, mangan út yvir tað vanliga. Samansetti stovnurin kravdi bygnaðarbroyting, og tað er har tú kemur inn í myndina. Okkum manglar deildarleiðara til bláu fyrisitingardeildina. Vit halda okkum hava góðar umstøður og kunnu bjóða eitt gott arbeiðsumhvørvi. Búnaðarstovan virkar í høvuðsheitum eftir lóg um landsjørð frá 2007 og tilhoyrandi kunngerð og mannagongdum.

**Starvsøki og ábyrgd**
Vit leita eftir einum sjálvstøðugum, positivum og arbeiðssomum persóni, ið ikki er bangin fyri at átaka sær leiðsluábyrgd fyri fyrisitingardeild stovnsins við øllum tí, sum tað inniber av arbeiðsuppgávum. Tekur tú av, verður tú serfrøðingur á einum spennandi øki við nógvum persónligum avbjóðingum.

Tað er umráðandi fyri teg, at tú dugir at delegera uppgávur og fylgja arbeiðinum upp. Starvið er sera fjølbroytt og uppgávurnar mangar. Tú mást sjálvstøðugt kunna samskifta við onnur, duga at samráðast, skriva frágreiðingar, fyrireika mál til fundir og samráðingar eins og at luttaka í samráðingum saman við stjóranum. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur løgfrøðiligt embætisprógv og royndir innan almenna fyrisiting, málsviðgerð og leiðslu.

**Stjórnarskrivari**
Sum fyrisitingarleiðari kemur tú at arbeiða tætt saman við stjóranum. Aftrat leiðsluni av fyrisitingardeildini skalt tú ráðgeva stjóranum í løgfrøðiligum spurningum og tulkingum eins og at virka sum stjóraskrivari og sparringspartnari.

**Setanartreytir**
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løg-frøðingarfelag Føroya, deildarleiðari I. Setanarøkið er Búnaðarstovan, umframt Fiskimálaráðið við stovnum.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal sendast við vanligum brævi til Búnaðarstovuna, stílað til Bjørn Patursson, stjóra, Frammi í Dali 166, 410 Kollafjørður ella við teldubrævi til bp@bst.fo

Umsóknarfreistin er 31. desember 2010.

Situr tú eftir við spurningum, ella vilt tú vita meir um starvið, kanst tú venda tær til Bjørn Patursson, stjóra.

BÚNAÐARSTOVAN
Frammi í Dali 166 · 410 Kollafjørður · tlf. 47 90 00 · fax 47 90 20 · bst@bst.fo · www.bst.fo






| | |
|---|---|
| **Miðvágur**, Høllin á Giljanesi | hósd. 16/12 kl. 19.00 |
| **Runavík**, Ítróttarhøllin | fríggjad. 17/12 kl. 19.00 |
| **Klaksvík**, KÍ høllin | leygard. 18/12 kl. 15.00 |
| **Tórshavn**, Høllin í Halsi | sunnud.19/12 kl. 14.30 + 18.30 |

Bílegging av atgongumerkjum á tel +45 20 86 60 10,
www.julecirkus.dk og við dyrnar ein tíma undan sýning.
Atgongumerkir eru eisini til sølu í Kunningarstovuni í Havn.